Fyrilestur um skaldið Martin Joensen á Listastevnuni

Martin Joensen, rithøvundur

Tá 100 ára hátíðarhald var í heimbygdini hjá Martin Joensen, helt Hanus Kamban fyrilestur um skaldið. Í samband við Listastevnuna heldur Hanus Kamban fyrilestur um Martin Joensen í Norðurlandahúsinum

Mynd: D.Olsen

100 ár eru síðani Martin Joensen, skald, var føddur í Sandvík. Hann er ein av stóru rithøvundum okkara, ið sera væl hevur lýst samtíð sína, slupptíðina, fólkini, føroyingin og ikki minst hevur hann givið teimum rúm, ið liva á lívsins skuggasíðu. Á Listastevnuni fer Hanus Kamban at halda fyrilestur um Martin Joensen

BÓKMENTAFRØÐI
Dagfinn Olsen

Nakað herfyri var hátíðarhald í Sandvík í samband við, at 100 ár vóru liðin síðani Martin Joensen var føddur. Martin var úr Sandvík og starvaðist eisini sum lærari har, til hann seinni fór at starvast á Tvøroyri.

Við hátíðarhaldið í Sandvík las Álvur Enni, lærari, ein fyrilestur, sum pápi hansara, Johs. Enni, hevði um skaldið fyri eini 20 árum síðani. Steinbjørn B. Jacobsen, skald og bygdamaður Martins, las minnisyrking og Hanus Kamban hevði fyrilestur um lív og skaldskap Martin Joensens.

Listastevnan tekur nú við og Hanus Kamban fer at halda fyrilestur á Listastevnuni um Martin Joensen, sum er ein av týðandi varðunum í føroyskum skaldskapi.

Eikin í skaldaskógvi okkara

Við hesum orðum mintist Petur M. Dam Martin Joensen í minningarorðunum um høvundan. Teir báðir vóru vinmenn og vinalag var húsana millum, tá Martin kom at starvast á Tvøroyri.

Í fyrilestrinum hjá Hanusi Kamban verður greitt frá høvundans uppvøkstri og andaligu fyritreytum. Verk verða umrødd og komið verður inn á persónslýsing, bygnað, málburð og samfelagslýsing og mun í stíli millum tær báðar bøkurnar Fiskimenn og Tað Lýsir á Landi.

Greitt verður frá hansara politisku og samfelagsligu áksoðan og hugsanum um mentan, átrúnað og mentanarpolitikk og einstaklingar, sum teir komu til sjóndar í hansara virki sum blaðstjóri og blaðmaður. Martin var eitt skifti blaðstjóri á Sosialinum.

Mannakennari

Hóast Martin ikki gav so nógvar bøkur út, so er tað, ið út er komið, alt varðar í okkara skaldskapi. Og føroyskir skúlanæmingar kenna allir skaldskapin. Við teimum báðum skaldsøgunum Fiskimenn og tað lýsir á Landi, vann Martin Joensen sær sess millum fremstu høvundar í okkara ungu bókmentasøgu.

Hann heldur seg til veruleikan. Samtíðina. Lýsur slupptíðina út í æsir, eins og bygdalív, vinnulív. Persónslýsingarnar eru framúr eins og lýsingarnar av samveruni manna millum.

Tá Fiskimenn kom út skrivaðu William Heinesen og Heðin Brú í viðurkennandi ummæli m.a., at "Martin Joensen er psykolog…". Og teir ráða fólki til at lesa søguna, sum teir meta gløgga og sera beinrakna. Sum bert ein mannakennari kann gera tað.

Skuggasíðan

Steinbjørn B. Jacobsen sigur í Varðanum 1978: Søgur Martins lýsa ofta fólk, sum frá føðingini og kringumstøðunum eru sett at liva á lívsins skuggasíðu.

Skaldskapurin Hjá Martin Joensen vísir okkum ymsu eginleikarnar hjá okkum menniskjum.

Heðin Brú sigur m.a. í fororðinum til "Klokkan Ringir": Beint sum Martin fór at royna seg sum søguskrivari, var tað eyðsýnt, at her var ein pennur, sum var út yvir tað vanliga. Hann lýsti fyndugari og sá gjøllari enn vit onnur. Málbrúk hansara skar í tann líkasæla lesaran og fekk hann at siga fyri munni sínum: Aha, soleiðis skal tað sigast.

Fyrilesturin um Martin Joensen verður í Norðurlandahúsinum mánadagin tann 12. august.

Stutt um Martin Joensen

Martin Joensen føddur 19. apríl 1902, í Sandvík. Giftur Linu Bjørgheim úr Havn.
Læraraprógv 1926, lærari á Økrum, Víkarbyrgi, Sandvík og Tvøroyri (1944-64).

Skrivaði greinar og stuttsøgur í bløð og tíðarrit og barnasøgur í barnabøkur og bløð.

Útgávur
1946: Fiskimenn (skaldsøga)
1949: Útrák (stuttsøgur)
1952: Tað lýsir á landi (skaldsøga)
1962: Klokkan ringir (stuttsøgur)
1977: Heimadoktarin (stuttsøgur)
1977: Gamli maðurin og varðin (stuttsøgur)

1962: Heiðursløn M.A. Jacobsens fyri Klokkan ringir, Tað lýsir á landi, Útrák og Fiskimenn.

Martin Joensen andaðist 25. desember 1966.

Mikudagin 16. oktober 2002

TÝSKLAND - FØROYAR

Ferðing:
Farið verður úr Føroyum til Hannover tann 13. sept og heimaftur til Føroyar aftaná dystin tann 16. sept.

Íroknað prísin er:
Flogferð Føroyar - Hannover - Føroyar, innivist í 3 nætur á hotel v/morgunmati, 2 útferðir, atgongumerki til dystin, bussflutningur í Hannover og ferðaavgjøld.

Grandhotel Mussmann*+**
kr. 6.190 *Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.790 *Fyri hvønn í einakamari*

Hotel Kønighof am Funkturn*
kr. 5.770 *Fyri hvønn í dupultkamari*
kr. 6.545 *Fyri hvønn í einakamari*

Túrurin kann bíleggjast hjá Atlantic Airways á 34 10 40

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

Greiða pisum frá um lestrarlívið

Tey, sum í vikuni hava fingið svar frá útbúgvingarstovnum í Danmark og aðrastaðni uttanlands, skulu nú gera seg til at flyta av landinum og byrja eitt nýtt lív sum lesandi. Sunnudagin fara nøkur av teimum, sum í løtuni lesa uttanlands, at greiða teimum, sum ætla sær undir lestur, frá um lívið sum lesandi uttanlands á árliga pisufundinum hjá MFS

LESTRARVEGLEIÐING
Ingrid Bjarnastein

Á hvørjum ári fara ungir føroyingar í stórum tali av landinum í lestrarørindum. Onkur ætlar sær bara eitt styttri skeið í útlegd, meðan onnur ivast í, um tey munnu fara at venda aftur.

Ofta kann tað tykjast møtumikið at siga farvæl til tað kenda og trygga og flyta av landinum, og hjá ikki so fáum av teimum pisunum, sum komandi mánaðin pakka klædsekkin, merkir lestrarbyrjanin eisini, at tær skulu flúgva úr reiðrinum hjá foreldrunum - nakrar fyri fyrstu ferð.

Tá pisurnar soleiðis skulu til heilt nýggjar umstøður, reisa nógvir spurningar seg, og sunnudagin fara umboð fyri Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) at royna at svara hesum sum frægast á árliga pisufundinum, sum felagið skipar fyri.

Á Platform

Í ár verður pisufundurin hildin í hølunum hjá Havnar Klubba, har diskotekið Platform heldur til. Á fundinum fara umboð fyri Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) at greiða frá um, hvat tað inniber at flyta uttanlands og byrja eina útbúgvingarleið har.

Á skránni eru millum annað íbúðarviðurskifti, stuðulsskipanir, herskylda og annars mannagongdir og reglur, ið eru umráðandi at kenna, tá ein byrjar á útbúgvingarstovni uttanlands.

Ymiskt er hvussu nógv pisurnar hava sett seg inn í viðurskiftini hjá teimum lesandi niðri, og tí verður eisini høvi hjá fundarluttakarunum at seta MFS-umboðunum spurningar bæði á fundinum og eftir fundin.

Flest til Danmarkar

Hjá nógv teimum flestu føroyingunum, sum velja at fara uttanlands at nema sær útbúgving, gongur leiðin til Danmarkar, og tí fer pisufundurin fyrst og fremst at snúgva seg um viðurskiftini hjá teimum, ið fara á danskar útbúgvingarstovnar. Men Altjóða Skrivstovan, ið ráðgevur føroyingum, ið fara út um ríkið at útbúgva seg, verður eisini umboðað á fundinum.

Umframt støðugt at arbeiða fyri at verja rættindini og betra umstøðurnar hjá føroyskum lesandi, hevur MFS tríggjar skrivstovur í Danmark, sum allar veita føroyskum lesandi vegleiðing. Høvuðsskrivstovan liggur í Keypmannahavn, og hinar báðar liggja í ávikavist Árhus og Odense. Harumframt reynir MFS at fjálga um frítíðarlívið hjá teimum føroysku lesandi í Danmark við at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag so sum kjakfundum, konsertum og dansi, sigur MFS í tíðindaskrivi um pisufundin.

Pisufundurin hjá MFS er ein fastur táttur, sum hvørt ár savnar ein stóran part av teimum, sum um ólavsøkuna hava fingið játtandi svar um upptøku frá útbúgvingarstovnum uttanlands, og nú fyrireika seg til at fara av landinum at nema sær útbúgving.

Pisufundurin verður á Platform í morgin, sunnudagin, klokkan 19.00.

Lýsið í bilatorginum

Avsláttur uppá ein góðan brúktan bil hesa vikuna

Premazy er aftur á goymslu
eisini eru nýggir bilar á goymslu

Tilboð:
frá Dekksøluni

Keyp 4
GJALD
FYRI 3

Íroknað áseting
og balansering

Vælkomin inn á gólvið

mazda

BERG MOTORS · 31 35 35